Heðin Mortensen **Nr. 91/2019**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um Hestleiðina, nú SSL aftur hevur tikið skip og túrar úr farleiðini út í Hest, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a).

1. Hví eru túrarnir, tilkalling kl. 07:00 á morgni, kl. 17:15 seinnapart og leygardag kl. 17:00, tiknir úr ferðaætlanini út í Hest?
2. SSL hevur skipini Teistan og Hasfjord, sum sigla fast til Skopunar. Hví verður mismunur gjørdur á hesum farleiðum?
3. Nú Hasfjord er komið í sigling er verri at røkja leiðina út í Hest við tilkalling. Hvør er orsøkin til tess?
4. Í løgtingslóg og fíggjarætlan stendur ikki serstakt hvat skip ella hvør farleið hevur sína egnu játtan, men ein heildarætlan er fyri alt økið hjá SSL. Hví fáa ikki øll økir eins tænastur og røkt?
5. Landsstýrismaðurin hevur upprættað eina nýggja rutusigling til Skopunar, tó at einki er játtað til hetta á fíggjarlógini uttan ein eykajáttan til keyp og umbygging. Er játtanin hjá SSL so rúmlig, at pláss er fyri nýggjari rutu, ella skulu vit vænta sparingar á Hestfarleiðini í staðin?

Viðmerkingar:

Hestfólk og avvarðandi, sum hava tilknýti til Hest, hava stórt ynski um, at ferðaætlanin sum var við tilkalling kl. 07:00 á morgni, kl. 17:15 seinnapart og leygardag kl. 17:00, kemur inn aftur í ferðaætlanina. Nú er eitt skip komið afturat, Hasfjord, saman við Spógvanum, og tí undrar tað ein, hví annað av hesum skipum ikki kann røkja hesa farleið, sum ynski er um, við tilkalling.

Hestfólk hava verið við skerdan lut, tá umræður samband til og frá Hesti. Fleksibiliteturin hevur alt at siga fyri at halda lív í eini útoyggj, og tað er alneyðugt fyri Hestfólk, sum hava fast arbeiði á meginøkinum, at sleppa yvirum á morgni til arbeiðis. Ein bygd/oyggj skal rekast og røkjast. Í Hesti er eisini nógv bóndalív og í lembing, hoyna, tá fjøllini verða gingin, slakti og øðrum kann verða neyðugt at fáa eykafólk at hjálpa til við hesum uppgávum. Hetta ber bert til, um farleiðin er nøktandi at koma til og frá. Eisini eru nógvar stórar tænastuveitingar at røkja í Hesti, skulu allar galdandi umhvørvislógir haldast. Talan er um stór flutningsakfør, sum skulu til og frá, so sum oljubilar, renovatiónsbilar, tøming av sóttartangum, vesivognar, kampingvognar, umframt kommunubilar til asfalt, gøtuljós o.m.a.

Hestur kann harafturat vera eitt áhugavert stað at vitja hjá ferðafólki. Skal ferðavinnan mennast í økinum er eisini neyðugt við nøktandi ferðasamband til hetta endamál.

Við vón um at landsstýrismaðurin, eisini sambært samgonguskjalinum hjá samgonguni, ber so í bandi, at Hestleiðin fær eina trygga, gevandi og álítandi farleið.

Á Løgtingi, 26. mai 2020

Heðin Mortensen